# Góður hýrur tá Faroe Petroleum læt upp skrivstovu í Stavanger



*Uttanfyri skrivstovuna, Nils Sørensen, Graham Stewart, Meinhard Jacobsen, Helge Hammer og Joe Darby*

**Við sangi og spæli rúnarbant Kjell Inge Torgersen tey, sum komin vóru til móttøkuna, tá ið Faroe Petroleum læt upp skrivstovu í Stavanger nú um dagarnar. Hann sang um svarta gullið, sum goymir seg undir havbotninum. Almenna upplatingin var ein inniligur og góður karmur um byrjanina hjá Faroe Petroleum í Stavanger og Noregi**

STAVANGER
*Ole Jacob Eide – Raude Media*
*Týtt til føroyskt: Petur Meinhard Magnussen, í starvsvenjing*



*Borgarstjórin í Stavanger, Leif J. Sevland, stýrisformaðurin hjá Faroe Petroleum, Joe Dadby og skrivarin í felagnum Julian Riddich.*



*Millum gestirnar var eisini Olaf Olsen*



*Helge Hammer, stjóri hjá Faroe Petroleum í Noregi*

Øll leiðslan í felagnum og nógvir gestir vóru hjástaddir í Øvre Strandgate 124, tá ið Faroe Petroleum alment legði lunnar undir sína skrivstovu í Noregi. Oljufelagið er ungt, og høvuðssætið liggur í Aberdeen. Felagið miðjar eftir at útvinna olju við Føroyar og Hetland men eisini í norskum øki.

Í Noregi stendur felagið fyri stórum avbjóðingum á einum trýstum arbeiðsmarknaði, men tað er týðiligt, at felagið trýr upp á virksemið í Noregi.

Faroe Petroleum hevur sett seg niður í Gamla Stavanger, sum norðmenn rópa hendan býarpartin.

Fyri at staðfesta sítt føroyska tilknýti, hevur felagið latið listamannin, Helga Joensen, pynta nýggju skrivstovuhølini. Helgi hevur sín uppruna í Føroyum, men hevur í fleiri ár búð í Stavanger.

Ein fegin norskur stjóri, Helgi Hammer, beyð vælkomin við almennu upplatingina av skrivstovuni. Hann vísti á flagg-symbolikkin við føroyska, skotska og norska flagginum, sum felagið hevur í hølunum. Skemtandi segði hann, at fólkið á oyggjunum vesturi í havinum – Føroyum – eru fólk, sum rýmdu undan skatti í Hardanger í Noregi.

Í síni røðu legði Helgi Hammer dent á góða sambandið millum tey trý londini og býirnar, Tórshavn, Aberdeen og Stavanger.

Helgi Hammer hevði eisini bjóðað borgarstjóranum, Leif Johan Sevland, til almennu upplatingina.

Leif ynskti tillukku við skrivstovuni og segði, at Stavanger er miðpunktið fyri slíkum virksemi. Hann segði, at í Stavanger eru tey fegin um, at eitt nýtt og týdningarmikið felag aftrat hevur sett seg niður í býnum. Borgarstjórin segði, at hetta eru spennandi tíðir fyri Faroe Petroleum og Føroyar, nú Statoil í hesum døgum borar í føroyskum øki. Hann lovaði at gera sítt til, at Faroe Petroleum fær eina góða byrjan í Noregi, men helt ikki, at hann kundi geva felagnum lyfti um verkfrøðingar, tí norski arbeiðsmarknaðurin er so "heitur" í løtuni. Hann helt tó, at Stavanger er eitt gott val hjá Faroe Petroleum. Við móttøkuna handaði Leif Johan Sevland felagnum ein málning, sum listamaðurin, Kjell Pahr Iversen, hevur málað.

Stýrisformaðurin í Faroe Petroleum, Joe Darby, helt, at Noreg avgjørt er besta landið hjá einum oljufelag at seta seg niður í. Hann helt, at felagið hevur møguleikar at menna seg við nýggju skrivstovuni.

Kjell Inge Torgersen setti punktum fyri móttøkuni við góðum og inniligum sangi og tónleiki. Hann sang um svarta gullið, sum goymir seg í havbotninum, og hann rúnarbant fólk úr orðum sum "Og tidevatn, går opp og ned, uendeleg, i all slags vær.." – eitt ørindi, sum fólk úr Føroyum, Skotlandi og Noregi kenna seg aftur í.